UTTAN ÚR HEIMI

### Biðja børn til hermenn

Altjóða barnahjálparstovnurin UNICEF vil vera við, at tamilsku uppreistrarmenninir í Sri Lanka hava gjørt sær dælt av, at nógv børn mistu foreldrini í flóðalduni annan jóladag.

Ted Chaiban, sum stendur fyri virkseminum hjá UNICEF í Sri Lanka, sigur, at stovnurin hevur fingið prógv fyri, at tamilsku uppreistrarmenninir royna at fáa tey foreldraleysu børnini at virka sum hermenn í bardaganum ímóti stjórnarherinum. Sambært Ted Chaiban veit UNICEF um trý børn, sum eru endað í einari legu hjá uppreistrarmonnunum, og nú roynir UNICEF at fáa fatur á teimum. Sambært stovninum eru tey trý børnini ættað úr einari bygd har eysturi í landinum. Hetta økið varð serliga meint rakt av flóðalduni.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at teir tamilsku uppreistrarmenninir brúka børn sum hermenn. Tvørturímóti hava nógv tamilsk børn gjørt hertænastu í tí drúgva borgarakrígnum.

### Vend komin í

Største bankin í Danmark, Danske Bank, sigur í einari frágreiðing, at tað eru fleiri tekin til, at vøkstur er aftur komin í danska búskapin.

Bankin vísir á, at nógvar fyritøkur søkja eftir fólki, talið á arbeiðsleysum minkar, og danir brúka pengar sum ongantíð fyrr. Steen Bocian, búskaparfrøðingur hjá Danske Bank, sigur við Politiken, at lýsingarnar eftir fólki eru øktar nógv ta seinastu tíðina, og hann ivast ikki í, at hendan gongdin fer at halda sær.

Dansk Jobindex, sum dagliga heldur eygað við, hvussu nógvar fyritøkur søkja eftir fólki, sigur við Politiken, at tað seinasta árið er talið á lýsingum eftir fólki vaksið umleið 20 prosent.

### Vilja hava løn fyri deyðsboð

Í Noregi vilja prestarnir ikki ganga við deyðsboðum longur, uttan at teir fáa samýning fyri tað.

Blaðið Vårt Land skrivar, at sambært setanartreytunum skulu norskir prestar bera fólki deyðsboð uttan samsýning, men nú vilja prestarnir hava løn afturfyri. Í seinastuni hava fleiri prestar sýtt fyri at fara við deyðsboðum, og tað hevur havt við sær, at í teimum førunum hevur løgreglan fingið uppgávuna. Men har hava tey lítlan hug at yvirtaka hendan partin av prestastarvinum. Á løgreglustøðini í Haugaland siga tey við Vårt Land, at prestarnir eru betur egnaðir at ganga við deyðaboðum, og harafturat hevur løgreglan annað at taka sær av.

Norska prestafelagið reisti spurningin um løn fyri at ganga við deyðsboðum fyri trimum árum síðani, og nú hevur kirkjuleiðslan játtað at taka spurningin upp. Partarnir skulu til samráðingarborðið seinni í mánaðinum.

### Bob Marley til Etiopia

Einkjan eftir reggaestjørnuna Bob Marley ætlar sær at flyta líkið av manninum úr Jamaica til Etiopia.

Rita Marley sigur við tíðindastovuna AP, at bæði kirkjan og myndugleikarnir í Etiopia hava játtað henni at flyta líkið av manninum hagar. Hon ætlar at jarða hann í einum býi har suðuri í landinum, og gongst eftir ætlan, verður jarðarferðin eina ferð í næsta mánað. Tá hevði reggae-stjørnan fylt 60 ár, og í Etiopia ætla tey at halda dagin við einum átaki, sum hevur fingið heitið "Africa Unite" eftir einum av løgunum hjá Bob Marley.

Bob Marley, sum varð borin í heim í Jamaica í 1945, doyði 36 ára gamal av krabbameini í Miami í 1981. Hann varð seinni jarðaður í Jamaica, men Rita Marley sigur við AP, at alt lív hansara snúði seg um Afrika, og at hann tí eigur at verða jarðaður har.

# Vænta borgarakríggj í Irak

**Egyptisku myndugleikarnir ávara nú um, at ófriðurin í Irak kann enda í einum veruligum borgarakríggi undan valinum 30. januar.**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ávaringin kemur frá egyptiska forsætisráðharranum, Ahmas Nazif.

– Hendir einki til tað betra, er vandi fyri, at ófriðurin endar í einum veruligum borgarakríggi, og at landið verður býtt sundur í fleiri partar, og at tað verða tey átrúnaðarligu viðurskiftini, sum seta markið, segði Ahmad Nazif í gjár, eftir at hann hevði verið í Jordan og tosað við Abdullah kong.

Sambært BBC hevur egyptiska ávaringin uttan iva samband við tilburðin, tá tveir av næstu medarbeiðarunum hjá shiamuslimska leiðaranum í Irak, Ali al-Sistani, vórðu myrdir í býnum Najaf mikudagin. Irakska løgreglan heldur, at tað vóru sunnimuslimskir uppreistrarmenn, sum skutu teir í einari roynd at elva til ófrið upp undir valið 30. januar. Hóskvøldið doyðu sjey shiamuslimar av einari bumbu uttan fyri eina mosku norðan fyri Bagdad.

Umleið 60 prosent av fólkinum í Irak eru shiamuslimar, og teir taka undir við at halda val tann 30. januar, tí valið eftir teirra tykki fer at geva teimum valdið í landinum. Hesum er tann sunnimuslimski minnilutin ímóti.

# Eingin bati



*Tað er ikki líkt til, at teir víðgongdu palestinsku bólkarnir leggja stórvegis í áheitanina frá nývalda forsetanum, Mahmoud Abbas, sum hevur biðið teir binda frið. Fyrrakvøldið lupu sjálvmorðsbumbumenn á eina ísraelska herstøð við Gaza-geiran, og seks ísraelsmenn og tríggir palestinar lótu lív. Ikki minni enn tríggir palestinskir bólkar søgdu seg hava skipað fyri álopinum*
*Mynd: Reuters*

# Flóðaldan elvir til størri fátækradømi

**Flóðaldan á jólum kann gera, at umleið tvær milliónir fólk í teimum raktu londunum enda í fátækradømi**

FLÓÐALDAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ógvusliga flóðaldan annan jóladag fer ikki at fáa stórvegis ávirkan á búskapin í Suðurasia, tí aldan rakti ikki nakran av teimum stóru býunum og heldur ikki nakað ídnaðarøki. Harafturímóti er vandi fyri, at tey lágløntu í teimum raktu økjunum verða uppaftur verri fyri, enn tey vóru frammanundan.

Tað sigur asiatiski menningarbankin í einari frágreiðing. Bankin vísir á, at 1,9 milliard fólk í Asia hava minni enn 12 krónur at liva fyri um dagin, og at hetta talið verður uppaftur størri nú. Bankin væntar, at meini enn ein millión indonesar, 600.000 indarar og 250.000 srilankar koma afturat orsakað av flóðalduni.

Londini, sum eiga pengar til góðar hjá teimum flóðalduraktu londunum, hava boðið sær til at frysta skuldina, men higartil hava bara Indonesia, Sri Lanka og Seychellurnar tikið av tilboðnum. Í Sri Lanka verður roknað við, at tað fer at kosta einar 20 milliardir krónur at bøta um skaðan av flóðalduni.